# HOND



NÆMINGAR

Tvøroyri hava fingið sær eina fríløtu - vinstrumegin: Rógvi Esmar Jacobsen, Strendur; Rasa Miksyte, Litavia; Senøva Petersen úr Sandavági, búsitandi í Havn; Sára Tóra Dam, Þorkeri; Hervør Knudsen úr Havn, búsitandi í Þorkeri og aftast leiðarin á skúlanum, Sanna Smith Hammer úr Hovi

Mynd: Jens Kristian Vang

eisini verið skipað soleiðis, at um evnið hevur verið ov víttfevnt, hava næmingarnir fingið nøkur persónlig amboð at arbeiða víðari við tekstinum.

Soleiðis kundu vit hyggja nærri eftir tí ávísina evninum heima við hús, samstundis sum vit fáa heildarmyndina við.

## Kostar

Sambært upplýsingum á heimasíðuni hjá »Youth With A Mission« í Føroyum, ella »Ung í Trúarverki« kostar tað umleið 38.000 krónur at ganga á skúlanum.

Hesa upphæddina varð Rógvi Esmar Jacobsen eisini noyddur at útvega sær.

– Eg var í teirri hepnu støðuni, at eg var í herinum í Afghanistan, og har vóru ikki so stórir møguleikar at brúka pengar.

– So eg átti nakað av peningi eftir, soleiðis at kundi sleppa á skúlan á Tvøroyri. Eg haldi faktist, at hesir pengarnar hava verið væl útgivnir, sigur hann við einum brosi.

# Bíðar eftir svari

– Ein av vinum mínum fortaldi mær um henda skúlan í Føroyum. Hon hevði sjálv undirvíst her, og tí hevði eg hug at royna hann, sigur einasti útlendski næmingurin á skúlanum, Rasa Miksyte úr Litavia.

Sjálv hevði hon ikki minstu hylling á, hvar Føroyar lógu. So har var ikki annað at gera, enn at googla eftir Føroyum.

– Nú havi eg verið her síðani í januar, og hetta hevur verið ein sera góð tíð, slær hon fast.

27 ára gamla Rasa vísir serliga til undirvísingina, sum hevur verið góð og grundleggjandi. Undirvísarar eru komnir úr mongum ymiskum londum. Serliga fegin hevur hon verið um undirvísingina í, hvør Gud veruliga er og hvat hann ger kring heimin.

– Tað er líkamikið um vit tosa um Føroyar, Suðurafrika ella Brasilia, so arbeiðir Gud á undurfullan hátt. Hann er tann sami her á landi sum alla aðrastaðni, og hann kann framvegis gera sín gerning í og við menniskjum.

Hvat Rasa fer at gera aftaná uppihaldið á lærusveinaskúlanum á Tvøroyri, veit hon ikki.

– Beint nú biði eg um, hvørt eg skal fara á annan lærusveinaskúla ella um Gud ætlar okkurt heilt annað við mær.

– Eg eri í øllum førum opin fyri teirri leið, sum Gud fer at vísa mær á, sigur Rasa Miksyte.

snorri@sosialurin.fo




*– Gud hevur stórar ætlanir við Føroyum, sigur 27 ára gamla Rasa Miksyte úr Litavia. Hon er einasti útlendski næmingurin á lærusveinaskúlanum á Tvøroyri*

Mynd: Jens Kristian Vang

# Eitt hermót og annað

Rógvi Esmar Jacobsen av Strondum hevur royndt eitt sindur av hvørjum.

Men leygardagin 20. juni í fjør gloymir hann ongatíð. Henda dagin var hann staddur í donsku herdeildini í Helmand landslutinum í Afghanistan.

Akfarið hann var í, koyrdi á eina minu, og slapp hann frá ógvusligu hendingini við einum minni skaða.

– Ja, uha, eg slapp væl frá hendingini. Eg valdi kortini at vera har til í oktober, og kom tá heim aftur, greiðir 23 ára gamli strandingurin frá.

Spurningurin var, hvat hann so skuldi takast við. Men hugskotið kom tá fram um at fara á lærusveinaskúlan á Tvøroyri. Og her byrjaði hann í januar mánaði.

Hann fekk svar upp á henda fyrra spurningin. Men tann seinni spurningurin í lívi hansara krevur eisini eitt svar: Hvat nú?

– Eg veit ikki rættiliga. Spurdi tú meg, áðrenn eg fór í herin, hevði eg uttan iva givið tær eina langa talu um, hvat eg ætlaði mær, hvørja útbúgving eg kundi hugsað mær og so framvegis.

– Men nú, eftir at hava sæð heimin, – tja, tað hevur broytt so mangt í mínum lívi. So eg veit ikki rættiliga, hvat eg fari at gera, tá hesin skúlin er liðugur. Nei, eg veit satt at siga ikki, sigur 23 ára gamli gamli Rógvi Esmar Jacobsen hugsunarsamur.

snorri@sosialurin.fo




*- Henda tíðin á lærusveinaskúlanum á Tvøroyri hevur givið mær eitt djúpri forstáilsi av Bíbliuni og hvør Gud er, sigur 23 ára gamli gamli Rógvi Esmar Jacobsen av Strondum*

Mynd: Jens Kristian Vang